




Puntur nr. 25




# Stórur áhugi fyri summarkappingini

**Áhugin fyri summar kappingini, sum endar í dag, hevur verið sera stórur, og tað hevur eisini sæst aftur á søluni av bløðum, har fleiri støð hava selt hvønn einasta Sosial meðan kappingin hevur verið**

Seinasti summarkappingardagur er í dag. Enn bíða vit tolin eftir summarinum her heima, og mugu taka til takkar við hendinga sóldøgum inn í millum. Men fyri fimm vikum síðani byrjaði summarkappingin, har føroyingar fingu høvi at lesa um ferðamál og kappast um uttanlandsferðir og góðveður. Og fólk hava hvønn dag blaðið er komið út, dúgliga klipt puntar út og sett saman. Í dag er seinasti puntur í blaðnum, so har er eitt at gera: tak saksin í hond, klipp út og líma á kalendaran.

- Tey eru fleiri, sum hava ringt inn og spurgt, um vit ikki kunnu senda teimum onkran punt, sum tey mangla. Men tíverri ber tað ikki til. Undirtøkan hevur verið so mikið stór, at blaðið hevur verið útselt nógvastaðni, og okkara blaðgoymsla er ikki so stór, at vit fáa sent puntar út til øll tey, sum mangla, sigur Gudny Langaard, marknaðarsamskipari á Sosialinum.

Og á Sosialinum hevur summarkappingin merkt blaðið nógv, og tað sæst eisini aftur á søluni. - Nógv sølustøð hava boðað frá, at blaðið hevur verið útselt meðan kappingin hevur verið, so vit kunnu bara staðfesta, at lesarin hevur tikið sera væl ímóti kappingini, veit Gudny Langaard at siga.

**Í dag er síðsti dagur**

Summarkappingin skuldi vara í fimm vikur, og tað hevur hon gjørt, tá tit í dag sita við blaðnum i hondini. Orsøkin til, at kappingin ikki endaði fríggjadagin er hon, at annan hvítusunnudag kom onki blað út, og harvið manglaði ein puntur. Tí var neyðugt at longja kappingina til í dag.

Puntarnar fólkini hava klipt út, skulu tey líma á kalendaran og síðani senda okkum hann. Freistin er 17. juni, og tá skulu allir kalendarar, sum vilja vera partur av lutakastinum um vinningar fyri tilsamans eina kvart millión, vera inni.

Millum vinningarnar í kappingini eru fleiri ferðir. Hepnu vinnararnir av hesum nýtast tó ikki at skunda sær á nakran hátt, tí vinningarnir kunnu eisini nýtast komandi ár.

**Óli aftur á baksíðuna**

Tey, sum ikki hava luttikið í summarkappingini, hava kanska ilskast um, at stuttligu og beinraknu tekningarnar hjá Óla P, eru fluttar inn í blaðið, og harvið máttu víkja fyri greinum um ferðamálum og lýsingum annars. Men nú er kappingin av, og tekningarnar vera aftur at síggja á baksíðuni, tá Óli fer at taka blýantin aftur í hond síðst í hesum mánaðinum.

Savnað puntarnar saman, líma og send okkum kalendaran so at vit hava hann í seinasta lagi mánadagin 17. juni

Send til:

Sosialurin
110 Tórshavn
Boks 76
viðm.: "Summarkapping"




